# Vilja flúgva laks til USA




*Nú kunnu tey á Faroe Ship bjóða fiskaútflytarum ein møguleika afturat sleppa á marknaðin við fiskavørum*

**Á Fish Fair fer Faroe Ship at greiða frá einum nýggjum tilboði til føroysku alivinnuna, sum eisini aðrir fiskaútflytarar kunnu fáa gagn av**

**FLUTNINGUR**

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tað eru nú trý ár síðani, at Skipafelagið í Føroyar og Eimskip í Íslandi løgdu saman í eitt samstarv og seinni fekk nýggja felagið sær navnið Faroe Ship.

Og síðani er felagið nógv ment og er í dag ført fyri at veita viðskiftafólki eina nógv fjølbroyttari og samanhangandi tænastu, enn fyrr.

-At samanbera rutusambandið fyrr og nú, er sum at samanbera nátt og dag, siga Allan Nolsøe Hansen, sølustjóri fyri útflutningi og Rene Dahl Olesen, sølustjóri fyri innflutningi og Faroe Express.

- Fyrr sigldu vit bara til Scrabster og Danmarkar, men í dag sigla vit til øll lond í Norðuratlantshavi og Norðurevropa, eins og vit hava egnar rutur til Baltalondini og til Russlands.

Men annars eru vit nú knýtt upp í heimsumfatandi flutningsnetið hjá Eimskip við skrivstovum í nógvum londum í øllum heiminum.

- Samstundis eru vit eisini knýtt uppí størstu frystihúsketu í heiminum og í løtuni byggja vit Frystigoymslur bæði í Klaksvík og í Kina. Goymslan í Kina rúma heili 50.000 tonsum, men møguleikar eru fyri at byggja hana út til at rúma 100.000 tonsum.

Tann í Klaksvík er knapt so stór, tí hon tekur 5.000 tons, ella 1/10 part av teirri í Kina.

- Samanumtikið er virksemið og tænastan hjá Faroe Ship munandi ment seinastu árini og vit eru í dag nógv betyri før fyri at veita eina heildartænastu.

## Snarflutning fyri vanligan prís

Eitt, sum hevur verið í stórari menning hesa síðstu tíðina, er tann parturin av tænastuni, sum eitur Faroe Express, sum nú er vorðin ein integeraður partur í Faroe Ship.

- Sostatt eru møguleikarnir fyri snarflutningi munandi batnaðir, so nú ber til at bíleggja eina vøru um morgunin og fáa hana leveraða um kvøldið - uttan at tað kostar eyka.

- Tað ber eisini til at skipa fyri snarflutningi við skipunum. Tað merkir, at er talan um sjófrakt, sum hevur skund, ber til at bera so í bandi, at vøran verður tann fyrsta, sum verður lossað í land og tann fyrsta, sum verður koyrd út.

Og hvat útkoyring viðvíkur hevur Faroe Ship eisini ment seg, tí felagið hevur keypt bæði land flutningstólini hjá Hera Thomsen og Farmaleiðum.

Sostatt er Faroe Ship nógv størsti flutningsveitari á landi í Føroyum og røkkur at kalla út í hvønn krók í landinum við lastbili bæði við vøru, sum verður innflutt og skal útflytast, og við vøru, sum verður send innanlands í Føroyum.

## Flúgva laks til Amerika

Men eitt, sum tey á Faroe Ship eru serliga spent upp á at marknaðarføra á Fish Fair, er ein nýggj tænasta, sum tey serliga hava snikkað saman til alivinnuna, men sum aðrir fiskaútflytarar eisini kunnu fáa gagn av.

Fiskurin, sum alivinnan tekur leygardagar, verður vanliga frystur og útfluttur fyrstur, tí tað eru ikki aðrir møguleikar, sum flutningssambandið nú er.

- Men nú ætla vit at bjóða okkum til at føra fiskin feskan til Íslands sunnudagar og úr Íslandi við flogfari hjá Iceland Air Carco yvir á Marknaðin í USA, ella aðrastaðni.

So kann fiskurin verða feskur á amerikanska marknaðinum mikunáttina.

Allan Nolsøe Hansen heldur, at hetta kann eisini vera eitt tilboð til aðrar fiskaframleiðarar, eitt nú tey, sum útflyta havtaskuspora, fesk fløk, ella annað.

Hann sigur, at teir hava loddað dýpið hjá føroyskum útflytarum og teir merkja avgjørt, at áhugi er til staðar.

Og hann ivast heldur ikki í, at marknaður er í USA fyri føroyskum laksi, tí tað hevur verið ein góður marknaður hjá íslendsku alivinnuni. Men hon er nógv minkað, so har er eitt tómrúm at fylla.

Annars førir Faroe Ship feskan fisk niður til Scrabster fríggjadag, koyra hann til London og flúgva til haðani USA.

Tað er fríggjadagsfiskur, men nú ætla vit eisini at fáa leygardagsfiskin við og fáa hann til USA umvegis Ísland.

Tann, sum vil vita meiri um Faroe Ship, kann eisini fara inn á heimasíðu teirra, sum tey hava lagt stóra orku í at dagføra og hon er at finna á www.faroeship.fo




NORDLYSID

Tann nýggi STILL RX 20 – hugaligasti elektriski gaffiltrukkurin.
Nógva megi og kraft, sum kann metast við evnini hjá einum motortrukki. At skifta battarí er sum at skifta hosur. Á myndini fær trukkurin battaríið skift við einum vatntøttum (IP65) STILL plattavogni EXU 16.

**Hevur tú hug?**
Vit royna gjarna, bæði tann lítla og tann stóra fyri tær í framsýningarhølunum á Kambsdali. STILL hevur uml. 25 % av marknaðinum tá tosað verður um el-gaffiltrukkar og eisini mest keypta el-trukkin í Danmark.
Meira fæst at vita á www.still.dk/RX

STILL
Achieve more.

P/f Esmar Simonsen
Kamsdalur FO-530 Fuglafjørður
Tel. 44 44 05 Fax 44 46 29
es@es.fo www.es.fo